


# Festlig innsløg til heimið

## – til tað, sum annars er eitt sindur keðiligt

TAÐ **KREVUR** HVØRKI NÓGVA **TÍÐ** ELLA **ORKU** AT GEVA HEIMINUM EIN **GLAÐAN** OG **HUMORISTISKAN** DÁM. HER ERU NØKUR **PREI** TIL AT PEPPA TAÐ **UPP**, SUM **ANNARS** SKJÓTT KANN **GERAST** EITT SINDUR **KEÐILIGT** OG **ÓPERSÓNLIGT**.



Hurðar fylla í grundini rættiliga nógv í heiminum, og tær eru sjáldan vakrar ella festligar á at líta. Men hvat við einum serligum hurðatapeti? Myndirnar eru óteljandi, og á stóru myndini sæst, hvussu nógv tað broytir við eini slíkari visuellari fellu í rúminum. Sí meiri á www.style-your-door.com



Wallstickers, sum eru klistrimerki til veggin, hava í eina tíð verið nógv at sæð. Tey kunnu




nýtast til nærum øll undirløg: tapet, gips, flísar, hurðar o.m.a., og tey kunnu skapa eitt stuttligt motiv á eini stórari flatu. Harvið gerst rúmið meiri áhugavert og humoristiskt. Her eru eitt par at seta á wc-hurðina. www.coolprint.dk



Vit hava øll nógvar leidningar í húsinum, og teir flestu eru gráir ella hvítir. Men ein snildur máti at fáa litir inn í heimið er við at skifta heldur tristu leidningarnar út við leidningar í alskyns litum.





Nú alt hevur verið hvítt í eina tíð, eru litirnir veruliga við at koma til heiður og æru aftur. Eitt blikk av máling kann skjótt geva møblunum lív og spæl.



Tapetið hevur eisini fingið endurreisn, men ikki bert til veggirnar. Hvat við at tapetsera og lakkera møblarnar? Ella gólvini? Bert hugflogið setur markið.